## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og lítið ella einki avfall. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og lítið ella einki avfall. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og eystri og út á seinnapartin regn. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, sunnudagin minni vindur. Lítið ella einki avfall og hitin millum 4 og 8 stig.

# Børn í Klaksvíkar Kommunu betri tannarøkt

TANNARØKT
*Rúna Sivertsen*

Eftir umsókn frá skúlatannlæknastovuni, játtaði býráðið í seinastu viku kr. 100.000, til fyribyrjgjandi tannviðgerð.

Játtanin verður latin í samband við, at ætlanin er at fara undir eina málrættaða fyribyrgjandi tannviðgerð, har eisini verður vitjað út á bygdaskúlar og í barnagarðar.

Men fyri at fíggjarætlanin hjá Klaksvíkar Kommunu 2003 skal halda, varð neyðugt hjá býráðnum at klípa burtur av øðrum játtanum, t.d. játtanini til grindaskaðar. Eisini aðrar smáar konto'ir máttu svíða fyri tannarøktini.

Berghild Gulakksen, tannarøktari, sigur, at tað hevur stóran týdning at upplýsa um tannarøkt í barnaárunum.

– Tað kostar í fystu syftu at upplýsa, men vit vinna tað aftur eftir fáum árum, sigur hon.

Mett verður, at um 30% av teimum, ið hava tannrættingar fyri neyðini, hava havt so ringar barnatenn, at neyðugt var at trekkja.

– Um børnini verða væl kunnaði um týdningin av at fara væl um tennirnar, kunnu tey seinni sleppa undan at ganga við »bøjla«, sigur tannarøktarin at enda við Sosialin.



*Emil kann saktans vísa sínar tenn, sigur Halldis á Grønastøð, tannlækni*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 10 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 6 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | ÷1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 19 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 995 hPa yvir Írlandi fer móti Íslandi og dýpist nakað. Brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum vestan fyri Føroyar.




Eitt djúpt lágtrýst, 962 hPa vestan fyri Írland á 55N-25V fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar fríggjadagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/11 kl. 06⁰⁰– 19/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,4°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 18/10 kl. 06⁰⁰– 19/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 129,3 mm


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo


### VESTFALLSKYRRINDI

16. nov.: Mánin longst frá jørðini
20. nov.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. nov | 06.31 | 18.51 | 05.31 | 17.51 | 05.46 | 18.06 | 08.31 | 20.51 | 09.31 | 21.51 | 04.46 | 17.06 | 03.46 | 16.06 | 06.46 | 19.06 | 07.46 | 20.06 | 06.16 | 18.36 | 07.31 | 19.51 |
| 21. nov | 07.11 | 19.33 | 06.11 | 18.33 | 06.26 | 18.48 | 09.11 | 21.33 | 10.11 | 22.33 | 05.26 | 17.48 | 04.26 | 16.48 | 07.26 | 19.48 | 08.26 | 20.48 | 06.56 | 19.18 | 08.11 | 20.33 |
| 22. nov | 07.56 | 20.20 | 06.56 | 19.20 | 07.11 | 19.35 | 09.56 | 22.20 | 10.56 | 23.20 | 06.11 | 18.35 | 05.11 | 17.35 | 08.11 | 20.35 | 09.11 | 21.35 | 07.41 | 20.05 | 08.56 | 21.20 |
| 23. nov | 08.44 | 21.08 | 07.44 | 20.08 | 07.59 | 20.23 | 10.44 | 23.08 | 11.44 | — | 06.59 | 19.23 | 05.59 | 18.23 | 08.59 | 21.23 | 09.59 | 22.23 | 08.29 | 20.53 | 09.44 | 22.08 |

5 707265 100036 >